## DAGSINS MEINING

# Førleikamenna alt samfelagið til oljuavbjóðing

Loksins varð farið aftur at bora á Atlantsmótinum. Føroyingar hava í eina tíð bíðað í spenningi eftir, at Amerada Hess saman við Dong, British Gas og føroyska oljufelagnum Atlants Kolvetni fóru at seta á bretsku megin markið og bora tann nógv umrødda avmarkingarbrunnin, ið kann geva svarið uppá, um fundið feløgini gjørdu á landgrunninum í fjør, er so mikið stórt og vælegnað, at tað kann byggjast út til framleiðslu.

Tað er greitt, at seinkingarnar hjá boriskipinum, kundu – um heilt illa vildi til – gjørt, at eingin boring fór at verða gjørd í ár, og hevði tað verið eitt stórt afturstig fyri Føroyaøkið sum heild. Ikki tí – henda boring er ikki avgerandi fyri, at tað verður leitað á landgrunninum, men hon hevur rættiliga stóran psykologiskan týdning til tess at kunna fasthalda og helst økja áhugan fyri Føroyum sum framtíðar oljuøki.

Við einum av heimsins mest framkomnu boriskipum, West Navion fór Amerada Hess sunnumorgunin í gongd við boringina, ið skal taka tveir mánaðir. Tann fyrsti fer til at bora umleið 4250 metrar niður í undirgrundina frá sjóvarmálanum. Verður troffið við olju og gass, verður alt fyri eitt farið at testa brunnin, tvs. at ein avmarkað royndarframleiðsla verður gjørd. Hon fer so vónandi at siga okkum, um feltið er rakstrarverdugt ella geva ábendingar um, um tað er vert at gera fleiri metingarbrunnar.

Sum skilst á oljufólki, ið vóru við á oljumessu í Stavanger herfyri, bíðar so gott sum allur oljuheimurin, sum hevur áhuga fyri Atlantsmótinum, eftir úrslitinum av hesi boringini. Og verður tað positivt, kann tað vera stigið, sum fær gongd á aftur oljutilgongdina á Føroyaøkinum.

Nú óvissan framvegis er stór um somu oljutilgongd, er ikki lætt at standa fyri eitt nú ráðstevnum, sum snúgva seg um Føroyar sum framtíðar oljuland. Tað er tó greitt, at oljuráðstevna verður hildin aftur í Føroyum í vetur, eins og hon hevur tað seinastu árini. Tó við stóru óvissuni í huganum verður talan helst bara um ein temadag, sum uttan iva verður merktur av vinnuligum áhugamálum. Tað er í sær sjálvum í lagi sum støðan er nú. Men tíðin er komin til, at vit tilrættaleggja eina serstaka ráðstevnu, sum í størri mun fevnir um ta samlaðu ávirkan, ið oljuvinnan fer at fáa á flest allar samfelagsins tættir.

Tað vildi tí verið eitt gott hugskot at enda temadagin í vetur við eini niðurstøðu og avgerð um, at t.d. vinnan, Norðurlandahúsið og t.d. Fróðskaparsetrið og Granskingarráðið í felag fyriskipa eina stóra ráðstevnu næsta heyst, sum serstakliga hyggur at øllum samfelagsbygnaðinum sæð í relatión til eina oljutilgongd. Okkara ráð skulu vera, at landsstýrismaðurin í oljumálum, sum umsitur stórar upphæddir frá oljufeløgunum til eitt nú førleikamenning, setur pening av til eina ráðstevnu, sum skal hava til endamál ikki bert at viðgera, hvussu vit førleikamenna vinnuna men alt samfelagið sum heild - til ta stóru avbjóðing, sum ein oljuvinna kann gerast. Finnur Hess olju í heyst er tað samtíðis startskotið til at fara undir at tilrættaleggja ta ráðstevnuna næsta ár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nakað av tí, sum sjónvarpið ikki bar víðari

**Jenis av Rana**



Í sjónvarpssendingum her fyri vórðu viðurskifti løgtingsmanna viðgjørd við atliti til onnur størv. Í fyrstu sending varð tosað við vinnulívsfólk, síðani við tveir av trimum læknum, ið eru valdir á løgting, og í seinastu sending varð tosað við løgtingsformannin.

Sum løgtingslimur og kommunulækni varð eg biðin um at svara spurningum um størvini, tað vildi eg fegin, tí eg kenni málið frá byrjan. Var ein av teimum fáu, sum royndi at forða tí risa lønarhækkan hjá løgtingsmonnum, sum **knappliga** segðist vera neyðug her og nú. Men tá hendan gjørdist veruleiki, og kravið um hálvt alment starv varð partur av lógini, so var tað eins natúrligt fyri meg beinavegin at virða hetta.

**Starvið er alment**

Tað var týdningarmikið beinavegin at fáa arbeiðs- og lønarviðurskifti míni samsvarandi lógini, men hetta var lættari sagt enn gjørt, tí tvístøða var millum teir partar, ið varðaðu av. Júst tí havi eg í dag hampuliga stórt skjalatilfar tøkt um málið (brøv frá almanna- og heilsumálaráðnum og løgtingsskrivstovuni til hvønn annan og meg), og nógvar samrøður vórðu við hesar almennu stovnar og fakfelag mítt, kommunulæknafelagið, áðrenn endaligan fund við landssýrismannin í almanna- og heilsumálum og embætisfólk hansara h. 23 august í fjør.

Ongantíð havi eg ivast í at starvið sum kommunulækni er alment. Vit verða settir í hetta starv av landsstýrinum, partar av lønini koma frá almanna- og heilsumálastýrinum, vit starvast í hølum, sum býráðið hevur bygt og rindar útreiðslurnar av, og restin av lønini kemur frá sjúkrakassanum, sum eg meti er almennur.

Hesi sjónarmið góðtók eg og førdi tey fram sum grundgeving fyri, at starvið er alment. At sjónarmið eru ímóti hesum, t.d. á pensjónsøkinum, skilji eg, men eg meti hetta at vera eitt mál fyri fakfelagið at fáa í rættlag.

**Til avloysari verður funnin**

Eftir fundin við landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum og nærmastu embætisfólk hansara varð greitt, at stýrið, sum beinleiðis fylgja av at kommunulæknarnir eru alment settir, hevði skyldu at søkja eftir avloysara í viðtaluni at arbeiða hálva tíð. Hetta varð eisini gjørt, lýst varð beinenvegin í Ugeskrift for Læger, men eingin søkti starvið. So skjótt eg varð afturvaldur í løgtingið, heitti eg aftur á almanna- og heilsumálastýrið, nú trivnaðarmálastýrið, at søkja, men útlitini fyri at fáa starvið sett mugu metast av vera smá vegna ein katastrofalan læknamangul í londunum uttanum okkum.

Tann dag tað eydnast arbeiðsgevara mínum at seta hálvtíðarstarvið sum lækni í 8. kommunulæknastarvinum í Suðurstreymi, arbeiði eg hálva tíð í hesum starvi. Hesum greiddi eg sjónvarpinum frá, men eisini, at um tað framhaldandi ikki eydnast at fáa avloysara, so kann fylgjan gerast, at eg velji at siga kommunulæknastarvið frá mær. Í løtuni eru mál í løgtinginum, sum hjarta mítt brennir heitt fyri at fáa loyst, hesum greiddi eg veljarunum frá í valstríðnum í vár, og eg fekk, meti eg, hollan stuðul til hetta. Samstundis røki eg dagliga heilsuviðurskifti teirra sjúklinga, sum hava valt og velja meg til hetta.

**Kjakið, ið manglar**

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni heitti eg staðiliga á landsstýri og løgting at taka læknamangulin í størsta álvara. Greiddi frá syrgiligu støðuni nógva staðir í landinum, har Sandoyggin, sunnara helvt av Suðuroynni og ikki minst Norðoyggjar eru ræðandi dømi um, hvussu støðan fer at síggja út um nøkur fá ár, um ikki grundleggjandi broytingar verða gjørdar. Broytingar, sum skulu bera í sær, at læknar føla tað attraktivt at gerast kommunulæknar- eisini í Føroyum. Sum er, er læknamangulin ein álvarslig hóttan, ikki bert hjá okkum, men í øllum Norðurlondum, og einki bendir á, at hann batnar í bræði.

Undir omanfyrinevndu viðgerð nevndi eg konkreta broyting, ið kundi verðið gjørd og sjálvur havi eg fleiri uppskot um slíkar. Men eg sakni kjakið, eitt kjak, sum fjølmiðlarnir saktans kundu byrjað, trupulleikin er teimum ikki ókendur. **Latið okkum skipa viðurskiftini, so læknar fáa hug at koma hendan vegin, og latið okkum fara væl við teimum, ið vit hava tann forrætt at hava fingið at starvast hjá okkum.**

# ”Rætti” føroyingurin!

**Schandorff Vang**

Eg havi ikki trupulleikar av, at aðrir nationalitetir integrera seg í føroyska samfelagið. Men viðmerkingarnar hjá Ivani Eginsson til eina oddagrein í Dimmalætting kunnu kennast ørkymlandi.

Í fyrsta broti heldur hann tað vera undarligt í hansara verð, at eitt sannført sambandsfólk kann skriva/siga seg vera ”rættan” føroying.

Er tað ikki júst tað sama sum at siga, at sambandsfólk eru ikki ”rættir” føroyingar?

Seinni í greinini setir Ivan nakrar spurningar, m.a. um at sýta honum at vera føroying.

Bera orð Ivan’s í fyrsta brotið í greinini ikki brá av at sýta sambandsfólki at vera føroyingar?

Verðin hjá Ivan kann ikki fevna um nógv, tá hann at enda í eini grein gloymir, hvat hann byrjaði greinina við!

Lat vera at tosa um grundleggjandi mannarættindi, tí longu í hasi greinini hevur tú sjálvur brotið hesi boð.

Hvørki Ivan ella nakar annar av hansara politisku floksfeløgum eru førir fyri at døma um, hvør er - ella skal vera - skýrdur ”rættur” føroyingur, heldur enn nakar annar.

Eg meti, at tá man er føddur og uppvaksin í Føroyum er man føroyingur - líka mikið hvønn politiskan lit man hevur.

Um eg so hevði flutt í annað land t.d. Rusland, so hevði eg integrera meg so væl eg kundi, men í hjartanum hevði eg altíð verið føroyingur - og sambandsmaður.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fíggingin av kirkjuni og samkomurnar, ið eru uttan fyri fólkakirkjuna

**Svenning av Lofti**



Allar samkomurnar, ið eru uttanfyri fólkakirkjuna, brøðrasamkomurnar, hvítusunnusamkomurnar, Adventistasamkoman og aðrar samkomur, skipa fyri sínum egnu viðurskiftum, gjalda sjálvi alla sína umsiting og rakstur.

Hesar samkomur fáa ikki og søkja heldur ikki landskassan um stuðul til virksemi sítt.

**Umvegis gjald til fólkakirkjuna**

Tað hevur verið frammi, at meirútreiðslurnar í samband við yvirtøkuna av fólkakirkjuni, skulu setast á fíggjarlógina. Verður hetta gjørt, so verða øll tey, sum hava meldað seg út úr fólkakirkjuni, tvingað umvegis at gjalda til raksturin av fólkakirkjuni.

Hetta er ikki rætt og er helst eisini í stríð við grundlógina.

Í øllum førum er tað ikki góður moralur.

Tað kann ikki vera meiningin at fólk uttanfyri fólkakirkjuna skulu bera ein part av rakstrarkostnaðinum av fólkakirkjuni.

Orsøkin er einføld: Vit hava meldað okkum út úr fólkakirkjuni.

Hetta er tað frælsið, sum hvør einstakur føroyingur hevur, sambært grundlógini. Hetta er tað sum verður kallað fyri trúarfrælsi.

Vit gjalda jú rakstrarkostnaðin av okkara egnu samkomu frammanundan!!!

**Kirkjubøkurnar**

Havi hoyrt, at ein av grundgevingunum fyri at lata meirkostnaðin av yvirtøkuni av fólkakirkjuni verða fíggjaðan yvir løgtingsfíggjalógina, er at prestarnir eisini gera eina tænastu fyri landsins myndugleikar, t.d. við at føra sokallaðu kirkjubøkurnar.

**Ein avoldað skipan**

At prestarnir hava innskrivingina um hendi, er ein avoldað skipan. Nú tá ið broytingar viðvíkjandi fólkakirkjuni kortini verða gjørdar er gylt høvi eisini at broyta hesa innskrivingarskipan, sum stavar frá eini tíð tá ið fólkakirkjan var einsamøll á økinum. Nú, ið trúarfrælsi hevur verið í mannaminni, og nógvar samkomur eru uttanfyri fólkakirkjuna, má staðfestast, at tann skipanin er ein leivd frá fortíðini. Hetta, at fríkirkjufólk skulu verða tvingað at fara til ein fólkakirkjuprest at innskrivað síni børn.

**Lat landsfólkayvirlitið taka sær av innskrivingini av nýføðingum**

Hatta við kirkjubókunum og kanska onkrum øðrum við, kann lættliga loysast við at landsfólkayvirlitið tekur av innskrivingini av øllum nýføðingum í Føroyum og øðrum við, sum hevur við hetta málið at gera

Í gomlum døgum var ringt samskifti og ongin telefon, tí varð prestur nýttur til hetta, hann ferðaðist kortini millum bygdir. Í dag er ein slík skipan als ikki neyðugt. Øll hava telefon og kunnu ringja til landsfólkayvirlitið.

**Fólkakirkjulimir eiga at gjalda sína egnu kirkju**

Tí vil eg heita á landsstýri og løgting um ikki at fløkja samkomurnar uttanfyri fólkakirkjuna uppí fíggingina av fólkakirkjuni, tað fer einans at skapa øsing, illvilja og tvídrátt.

Fólkakirkjulimirnar eiga at gjalda sína egnu kirkju og raksturin og avgera stýringina av henni, soleiðis sum øll onnur trúarsamfeløg í Føroym gera.

# Dimma kvalist í egnum fordómum

**Høgni Hoydal**
*Formaður í Tjóðveldisflokkinum*



Sjáldan havi eg lisið eina so avdúkandi oddagrein, sum hana, ið Dimma borðreiddi við leygardagin 31. august 2002.

Hon hevði alt tað, sum eg annars haldi, at Dimma hevur vent sær frá í tíðindaflutninginum. Minti mest av øllum um Dagblaðið, tá tað er villast.

Har vóru allir tættir: Rasisma. Persónlig niðurgerð av øðrvísi hugsandi. Jantulóg. Skerjing av talufrælsinum hjá fólki. Húðaskógvamentan. Ræðsla fyri øllum uttaneftir. At koyra fólk í bás, orsakað av egnum fordómum og óvitan. So barnsliga skrivað, at ein triðjafloksnæmingur hevði dumpað. Og so sjúkligt í innihaldinum, at ein og hvør hevði verið sendur til sálarfrøðing fyri slíkt.

Uttan at tora at seta navn undir, sjálvsagt.

Var hetta álopið móti undirritaða ella øðrum politikara, so hevði hetta verið tað vanliga, og hevði farið aftur við borðinum.

Men hetta vil eg ikki lata fara. Í hesum føri prentaði landsins størsta blað eitt anonymt persónsálop móti kassameistaranum hjá Unga Tjóðveldinum.

Hví?

- Jú, tí hann er vaksin upp í Russlandi. Hann er tjóðveldismaður. Og hann loyvir sær at siga sína hugsan alment - við fullum navni.

Tá hevur mann ongan rætt sum menniskja og borgari í hesum landi - sambært Dimmu. Tá skal mann tiga ella sleppa sær burtur - sambært Dimmu. Og tá er mann helst ein farligur og undirgravandi kommunistur - sambært Dimmu.

Hevði Dimma viljað, so hevði hon annars kunnað lært nógv av hesum føroyingi, sum hevur upplivað, hvat tað veruliga var at liva í Russlandi - bæði av ringum og góðum. Hon kundi havt lært nógv um, hvønn sjónarring og hvørja vitan hesin skilamaður hevur um heimin og søguna.

Og anonymi oddagreinaskrivarin hevði eisini kunnað lært, at tjóðveldishugsjónin snýr seg um virðing og javnrættindi. Um at hava virðing fyri bæði sær sjálvum og fyri øðrum. Tí hevur tú ikki tað, so hevur tú hvørki.

Tað hevur oddagreinin í Dimmu prógvað. Hon hevur hvørki virðing fyri øðrum ella fyri sær sjálvum. Hon roynir at tala til tað lægsta hjá fólki og til tann innara svínhundin.

Men tíbetur kvalist hon í egnum fordómum. Og tað einasta, sum hoyrist í harkarínum, er svínhundurin sjálvur.

Gangi út frá, at blaðstjórin fer at greiða frá, hvussu eitt blað kann prenta slíkt í Føroyum 2002.

# Miðflokkurin vil júst hjálpa kvinnunum og børnunum

**Jónfinn Olsen**
*Form. í UfM*



Eftir at hava lisið greinina hjá Anniku W. Joensen kann eg ikki annað enn at skriva nøkur orð. Fosturtøka er ikki nakað, vit skula velja fram um lívið, men kvinnan ræður álíkavæl sjálv, hvat hon ger, tað er ikki hetta, familjumálaráðharrin er úti eftir, men hann vil kanna hvørjar orsøkirnar eru, til at talið av fosturtøkum er so høgt, og hvussu vit í Føroyum kunna fyribyrgja, at so mong børn sum í dag ikki síggja dagsins ljós.

Vísir hetta seg at vera sosialir og aðrir trupulleikar í samfelagi okkara, so má nakað gerast fyri at hjálpa hesum kvinnum og børnum teirra, og tað kann ikki vera nakað skeivt í, at okkara familjumálaráðharri roynir at finna fram til ein bata fyri kvinnur og børn teirra, ið enda í tílíkari støðu.

Tú efirlýsir, hvar maðurin er í øllum hesum, er tað ikki mangan so, at eingin maður er? Men at maður og kvinna ofta hava sex í dag sum ein vanligan part uttan fyri hjúnalagið, og tí er støðan ofta tann, at kvinnan stendur einsamøll, tá hon er komin í ta støðu at vera vorðin við barn. Hetta kann hugsast, men er ikki pent av manninum, um so er, men um vit settu hjúnarlagið í hásæti og hesi giftust, so var støðan ein onnur.

Annars tøkk fyri at tú ert opin um evnið, og vil eg geva tær rætt í, at revsingin fyri at gera seg inn á kvinnur og børn skuldi verði nógv strangari í Føroyum.